VIÐMERKING

# Alduorkuverk við Nípuna í Miðvági

Gunnar Nattestad

El-felagið SEV og oljufelagið ENI saman við Wavegen hava stovnað eitt felag, sum teir nevna SeWave, hetta felag hevur ætlan um at byggja eitt alduorkuverk út í Nípu.

Hetta alduorkuverk er bert eitt royndarverk, sum fer at geva eina sera lítla el-orku, í mun til tað ógvusligu ávirkan á eitt av Føroya vakrastu náttúruøkjum og vil harafturat hava eina oyðandi ávirkan á allan heiðafuglin.

Sambært tí, sum eg havi fingið upplýst, ætla teir at gera ein veg, út í Nípu, har ein tunnil verður borðaður úti í Svanga.

Her nevni eg nakrar vansar við hesi ætlan:

1. Vegurin vil hava eina ógvusliga ávirkan á hetta náttúruøkið.
2. Bil ferðsla út til tunnilsmunnan.
3. Heiðafuglur vil ikki støðast har longur.
4. Tað er ein stórur vandi fyri, at ristingarnir frá spreingingunum kunnu gera, at eitt stórt økið av Nípubergi rapar niður, av tí at har er so nógv leyst tilfarð.
5. Tá hesi 8 stóru hol eru sprongd út í Nípubergi, er ein vandi fyri, at brimið fer at gera tey størri og og møguleiki verður fyri omanlopi.
6. Eitt stórt plast-rør má leggjast frá tunnilsmunnanum og út til Bøssdalafoss ímeðan eirbeiðið fer fram, av tí at borislammið ikki kann fara út í Leitisvatn, sum verður nýtt til drekkivatn.

Fyrsta byggistig er við eini turbinu uppá 200 KW, sum teir rokna við, fer at geva í miðal 57% ella 114 KW. Men tað er ov høgt sett, av tí at tað mangan er kyrt undir Nípu Barmi og enn ongar aldumátingar gjørdar.

Til samanberingar ger Vestas vindmyllur frá 650 - 4500 KW.

Um allar turbinurnar verða bygdar, fer tað at kosta 93 milliónir, sum kann blíva væl hægri, um tað verður leyst tilfar í tunnilinum.

Um tað verður eitt portur fyri tunnilsmunnan, so fær turbinan eitt móttrýst og harvið vil turbinan ikki verða so effektiv. Um tunnilin verður opin, vil turbinan verða nógv effektivari, men so verður tað sum ein yvirvaksin blokkfloyta, sum vil ávirka alt umhvørvið.

SEV hevur nú í fleiri ár, havt eina stóra mótstøðu ímóti vindmyllum, av tí at el-netið skal verða ov veikt til, at taka ímóti orku frá vindmyllum. Men hetta alduorkuverk fer eisini at geva eina óstøðuga orku, tí at tað ikki altíð er brim við Nípuna. Allar hesar milliónirnar kundu verði nógv betur nyttar, við at sett fleiri stórar vindmyllur upp. Og tað sum el-netið hjá SEV ikki er ført fyri at taka ímóti, kann nýtast til at framleiða Brint við, sum so verður nýtt til "brændselcellir".

Tað fyrikemur mær sum, at hetta er eitt prestigu projekt, sum bara skal trumfast ígjøgnum uttan at hugsa um fylgjurnar.

Eg vil hervið heita á Miðvágs Kommunu, um at nokta byggiloyvið til hesa verkætlan.

# Roknimeistari í fullveldismálum

Helgi Abrahamsen



Seinasta leygardag setti eg, í eini stuttari blaðgrein, eitt einkult roknistykki upp, sum vísti, hvussu nógv løgtingssamtyktin um at lækka blokkstuðulin við 366 mió. krónum um árið, higartil hevur kostað. Úrslitið vísti, at henda eina løgtingssamtyktin hevur higartil kostað føroyingum 1.281 mió. krónur. Síðani divideraði eg talið við 6.000, (sum er talið av pensjónistum í Føroyum), og kom til tað úrslit, at blokkniðurskurðurin hevur higartil kostað 213.500 krónur fyri hvønn pensjónist í landinum.

Høgni Hoydal hevur helst fingið ilt í samvitskuna av hesi greinini, og í Dimmalætting mánakvøldið roynir hann at vaska hendur. Tað skilji eg sera væl.

Høgni trein inn á politiska pallin í 1998 við at siga føroyingum, at blokkstuðulin fíggjaði onga vælferð í Føroyum. Hann segði, at tað kundi prógvast, at pengarnir fóru til onnur endamál, og at um vit strikaðu hesa inntøkuna, so fór hetta als ikki at ganga útyvir føroysku vælferðina. Í dag síggja vit øll, at hetta var ikki so, og tí má Høgni gera alt fyri at venda kjakinum aðrar vegir, nú eg kanska gekk tí ov nær. Hetta var høvuðsendamálið við grein hansara mánakvøldið.

Høgni roynir at gera gjøldur burtur úr míni blaðgrein við at siga, at hetta er bara nakað, sum eg havi roknað út við lumma-roknara. Nú veit eg ikki, hvørji amboð Høgni brúkar, tá hann roknar, men um so er, at hann hevur onnur betri amboð enn lummaroknara, so skal hann vera meira enn vælkomin at siga okkum frá, um hesi framkomnu amboð skuldu komið til annað úrslit enn at 366 milliónir ferðir 3,5 er 1.281 milliónir. Eisini skal hann vera vælkomin at boða frá, um 1.281 milliónir býttar millum 6.000 pensjónistar geva annað úrslit enn 213.500 í part. - Eg bíði við spenningi.

Síðani spælir Høgni hasa gomlu plátuna um at Føroyar fóru á heysin undir verandi samfelagsskipan. Men hann gloymur (aftur hesa ferð) at fortelja okkum, undir hvørjari skipan tað var, at Føroyar reistu seg aftur aftaná kreppuna. Var tað ikki eisini undir heimastýrisskipanini og við fullum blokkstuðli ? Ella veit Høgni um nakra samfelagsskipan, sum er so genialt samansett, at tað ikki ber til at fara á heysin undir henni, líkamikið hvussu tú stýrir ?

Høgni vísir síðani á, hvussu Tjóðveldisflokkurin hevur raðfest, tá hann hevur sitið í samgongu, og sum dømi um hetta nevnir hann bara seinastu tvey valskeiðini. Hví fer hann ikki longur aftur ? Er kanska okkurt har, sum ikki er so hugaligur lesnaður ?

Hann sigur síðani: "Harafturat høvdu vit yvirskot hvørt ár á fíggjarlógini, tí vit brúktu ongantíð meira enn vit tjentu". Her gloymir hann at siga, at í 2004 gjørdi Tjóðveldisflokkurin eitt alternativt fíggjarlógaruppskot sum hevði 100 mió. krónur í halli áðrenn avdrøg, hóast 600 mió. krónir í blokkstuðli stóðu á inntøkusíðuni. Tað vil siga, at 700 mió. krónur manglaðu í, um ein "fullveldisfíggjarlóg" var endamálið. Og eg má spyrja: Hví gjørdi Tjóðveldisflokkurin ikki aftur eitt alternativt fíggjarlógaruppskot fyri 2005 ? Var tað kanska ov píniligt og avdúkandi ?

Høgni reypar í greinini um peningin sum teir spardu upp. Veit hann ikki av, at upphæddin sum teir spardu upp var nógv minni, enn tað sum landskassin fekk í blokkstuðli tey árini meðan teir sótu í Tinganesi? Hvat vóru tað so fyri pengar, sum teir spardu upp?

Og so spælir hann enn einaferð í hesari greinini leiklutin sum tann rættvísi, sum ikki kann góðtaka, at menn sum hann og aðrir tingmenn, ið hava stóra inntøku, fáa skattalætta. Men hví hava tingmenn so stóra inntøku ? Var hetta ikki eitt fyrsta, sum fullveldislandsstýrið syrgdi fyri eftir valið í 1998, at lønin hjá tingmonnum skuldi hækka ? Heldur Høgni at føroyingar hava gloymt tað ?

Restin av greinini er ein roynd at benda kjakið burtur frá evninum, so tað lati eg liggja.

# Okkara eldru – og ríkisveitingin

**Avleiðinganar av at undanfarna samgonga skerdi ríkisveitingina merkjast nú av álvara. Stórt hall er á fíggjarlógini. Vit spurdu júst um avleiðingarnar – men fingu onki svar**

Marjus Dam
*løgtingsmaður*



So leingi, ið Sambandsflokkurin situr í samgongu, hava tey eldru onki at óttast. Tit eldru verða ikki slept uppá fjall. Eldraøki skal styrkjast og mennast. Alt annað er brot á samgonguskjalið og óvirðiligt. Tað undrar stórliga, at tað kann koma so langt, at haldast skal uppat at gera mat til tey eldru, tá tørvur júst er á, at hendan skipan verður enn meira útbygd.

Víðari hoyrist eisini, at skerjingar eru innan heimarøktina. Hendan skerjing er so ógvuslig, at mong eldri liggja heima í eini neyðar støðu.

Øll skipanin má endurskoðast, so vit fáa at síggja hvat peningurin til økið fer. Fer hann til tey eldru, ella til annað, ið onki hevur við tey eldru at gera?

Tjóðveldispolitikkarar finnast at støðuni. Og eg eri fyri einaferð skyld samdur við teimum í, at okkara eldru skulu hava ein virðiligan aldurdóm. Tað er millum annað av júst hesi orsøk, at eg eri Sambandsmaður. Men neyðugt er samstundis at vísa á, at júst Tjóðveldispolitikkur er størsta hóttan ímóti okkara samfelagi og ímóti okkara eldru.

Skerjingin av ríkisveitingini er orsøkin til at vit hava hall á fíggjarlógini, og at peningur tørvar allarstaðir.

Journalistar spyrja dúgliga fyri tíðina, serliga teir, ið eru mikrofonhaldarar fyri tjóðveldisflokkin. Hví spurdu hesir journalistar onki um hvør avleiðingin var av at skerja ríkisveitingina á sinni. Tí sjálvandi kom tað at ávirka. Tað merkja tey eldru í hesum døgum. Eins og fólk innan heilsuverki, skúlar og fólk innan vinnuna. Hví varð onki spurt tá, heldur enn at bert spurt verður nú. Teir duga at spyrja.

Eg haldi, at vit eiga at samráðast ríkisveitingina uppaftur í 2006. Tí vit kunnu ikki bjóða okkara eldru og starvsfólkum har eins og skúlum og vinnulívi at verða knúskaði niður í armóð tí Tjóðveldisflokkurin og nakrir aðrir gjørdu ein stóran politiskan brølara við at skerja ríkisveitingina. Higartil hava vit mist óneyðugt 1500 milliónir krónur. Tað merkist. Men nú er neyðugt at royna at arbeiða sum ein góður politikari, og royna at bøta um tann polisiska skaða ið er gjørdur. Rokningin kann ikki sendast til tey eldru og tey veiku. Tað ber ikki til. Og sum er, so megnar vinnulívið neyvar eina stóra rokning omaná halli hjá fleiri av teimum.

Tað er neyðugt, at vit hækka ríkisveitingina aftur við komandi samráðingar við stjórnina.